# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um krabba í orbita

## Sjúkueyðkenni, ið skulu geva illgruna um krabba í orbita

Niðanfyristandandi sjúkueyðkenni geva illgruna um krabba í orbita

- Framstandandi eygu
- Trýst aftan fyri eygað
- Pína
- Nýuppstaðin dupultsjón
- Versnað sjón ella broytt sjónsgóðska/litsjón

GG! Ávísandi lækna skal kanna TSH

## Ávísing sendast til krabbameinsútgreining tá:

Grundaður illgruni um krabba í orbita íkemur tá:

- Sjúkueyðkenni til staðar sum lýst omanfyri
- Normalt TSH
- Tumor ávístur við CT- ella MR-skanning gjørd av aðrari orsøk

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um krabba í orbita" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026